Føroyska samfelagið stórar møguleikar sum veitari til oljuvinnu

Jan Müller

22.09.2013 - 19:12

Oljan >

"Umhugsað eigur at verða at gera eina yvirskipaða vinnupolitiska ætlan fyri oljusektorin, so at vit optimera tað, sum vinnan og samfelagið kunnu fáa burturúr og gera hetta til eitt enn sterkari búskaparligt bein at standa á. Hetta kundi so t.d. kanska eisini verið samantvinnað við strembanini eftir fólkavøkstri," sigur stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen, sum heldur veitingarvinnuna til oljuídnaðin vera so mikið væleydnaða, at vit um nøkur ár ikki bara fara at tosa um inntøku til landið uppá hundraðtals milliónir men ivaleyst um milliardaupphædd. Og verða kolvetni haraftrat funnin við Føroyar verður eftirspurningurin stórur eftir føroyskum veitingum longu um nøkur ár.

Jarðfeingi við

Millum føroyingarnar á oljumessuni í Aberdeen herfyri var eisini stjórin á Jarðfeingi, Petur

Joensen. Stæddur á føroyska básinum gjørdi hann sítt til at kunna mongu útlendsku vitjandi um føroyska oljuleiting og møguleikarnar her. Eisini vitjaði hann tíggjutals básar á messuni og luttók á teimum spennandi og áhugaverdu framløgunum um framtíðar oljuvinnu.

Petur Joensen hevði so eisini høvi at gera sær sínar tankar og metingar um, hvørjir møguleikar liggja í menning av eini føroyskari oljuvinnu og her ikki minst veitingarvinnuni, sum so smátt er við at fáa fótin fyri seg. Oljan.fo spurdi oljustjóran, hvat hevði størst týdning fyri hann á messuni.

Ein jalig uppliving

"Má siga, at tað var ein sera jalig uppliving at vera á olju- og frálandamessuni "Offshore Europe" í Aberdeen herfyri. Henda messa er at kalla burturav ætlað undirveitarum til oljuvinnuna, og tí vóru ikki so nógv leitifólk at hitta, ið kanska eru tey mest áhugaverdu, tá hugsað verður um at fáa leitivirksemi til Føroya. Tó so, onkur leitifólk vóru eisini har, og okkurt prátið fekst við tey. Hóast hesi ikki høvdu beinleiðis so nógv við føroyska økið at gera, var tað m.a. tað stuttligt at hitta ein av jarðfrøðingunum, ið hevði arbeitt í Føroyum við Marjun-brunninum, tá hesin varð boraður í 2001. Men tað mest jaliga var at uppliva føroysku veitaravinnuna," sigur Petur Joensen.

Jarðfeingi hevur verið við øll árini, síðani føroyingar byrjaðu at luttaka á hesum messum. Tað er, sum longu nevnt ikki fyri at fáa sambond til fólk við ábyrgd fyri leiting, men eftir ynski frá føroysku vinnuni. Nógvir spurningar koma um viðurskiftini í Føroyum, sum Jarðfeingi so kann greiða frá.

Miðvís føroysk vinna

Petur Joensen vísir á, at tað, sum ein legði serliga til merkis á hesi stevnuni, var, hvussu miðvís føroyska vinnan var.

"Tað er heilt greitt, at tað kennist øðrvísi, nú fleiri av føroysku fyritøkunum hava ment sambond við útlendskar keyparar og arbeiða hart við at menna sambondini enn meira og knýta nýggj sambond. Fleiri fyritøkur eru komnar yvir tað at skula prógva sínar førleikar; tey hava góðar tilvísingar frá tí virksemi, tær eru partur av nú. Tey hava – um ein so kann siga – fingið fótin inn um, og halda áfram. Harumframt hava vit eisini fingið betri innlit í hetta virksemið, og tað njóta tær "nýggju" fyritøkurnar kanska gott av, sum eisini hava sera áhugaverdar ætlanir."

Petur Joensen sigur víðari, at tað skerst ikki burtur, at nógv er broytt frá fyrstu árunum, tá vónirnar hjá føroyskum veitarum vóru stórar, men kanska ikki so nógv sum væntað kom burturúr, til nú, tá føroyskar fyritøkur vinna í hundraðtals milliónir til landið, og hundraðtals føroyingar arbeiða runt um í heiminum innan oljuvinnuna. Tær høgu vónirnar, sum vit onkuntíð hava sagt vóru ov høgar, vísa seg nú kanska ikki at hava verið heilt við síðuna av kortini. Gongdin gjørdist ikki júst sum væntað, men nógv er komið burturúr.

Eiga fara víðari

“Tá vit so standa her, vit standa nú, og hugsa frameftir, er nærliggjandi at hugsa, at vit eiga ikki at steðga her. Vit eiga at fara víðari. Besta prógvið uppá, at tað ber til, er júst at hyggja eini 10-12 ár aftur í tíðina og nú staðfesta, at sera nógv er broytt – føroyskari vinnu og landinum at frama. Um nøkur ár tosa vit kanska ikki bara um inntøku til landið uppá hundraðtals milliónir, men ivaleyst um milliardaupphædd.

Ovurstórur marknaður
Marknaðurin beint rundan um okkum er ovurhonds stórur. Og tað tykist hann at fara at vera nógv ár fram. So her er veruliga nakað at satsa uppá. Vit kunnu veita meira av teimum tænastunum, vit veita nú, men vit kunnu saktans eisini hugsa um aðrar tænastur. Tá ein gongur runt á messum sum Offshore Europe og sær, hvat verður boðið út, kann ein staðfesta, at føroyingar saktans kundu veitt nógvar av teimum vørunum/tænastunum, um ein bara sær uppá tað frá eini førleikasíðu. Um ein kann læra nakað av teimum fyritøkum, sum nú hava fingið fótin fastan, so er tað nakað við at hava fokus á, hvat ein vil, og at halda á – ikki gevast, hóast tað kann tykjast tungt í byrjanini.”

Veitaravinnan egin sektorur
Veitaravinnan til oljuídnaðin er í dag ein so stórur partur av føroyska búskapinum, at Petur Joensen heldur, at hon kann definerast sum ein egin sektorur – eins og t.d. fiskivinnan er tað.
“Eg havi áður vístá, at frá politiskari síðu átti at verið umhugsað at gera eina yvirskipaða vinnupolitiska ætlan fyri hendan sektorin, so at vit optimera tað, sum vinnan og samfelagið kunnu fáa burturúr og gera hetta til eitt enn sterkari búskaparligt bein at standa á. Hetta kundi so t.d. kanska eisini verið samantvinnað við strembanini eftir fólkavøkstri.

Verður tað so, at kolvetni verða funnin við Føroyar í nóg stórum mongdum til at seta framleiðslu í verk, so verður sjálvandi eisini stórur eftirspurningur eftir veitingum frá føroyskum fyritøkum, men tað er ongin orsøk til at seta seg at bíða eftir tí. Tað kann í besta føri verða um nøkur ár, at hetta møguliga gerst aktuelt.”

Myndir
Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi var við á oljumessuni í Aberdeen herfyri og heldur, at vit sum veitaraland hava nógvar møguleikar.

1F72
UPSTREAM OIL & GAS NEWSPAPER

UPSTREAM OIL & GAS NEWSPAPER